# Fjarðafestivalurin

**Fjarðafestivalredaktiónin:**


Snorri Brend
snorri@sosialurin.fo


Dagfinn Olsen
dagfinn@sosialurin.fo


Jens Kristian Vang
jensk@sosialurin.fo


Álvur Haraldsen
alvur@sosialurin.fo

## Mikudagin: Norðoyastevna

## Skeið og fyrilestrar

Á ársins Fjarðafestivali verður ikki bert tónleikur á skránni.

Undan øllum framførslunum av tónleiki, verður eitt seminar hildið við einum hópi av áhugaverdum fyrilestrum og fyrilestrarhaldarum.

Hetta seminarið byrjar longu í kvøld við tveimum fyrilestrum í Kelduni. Annar fyrilesturin er við Símuni Absalonsen sum fer at tosa um kristnu heimsmyndina og naturalismuna, meðan teir báðir, Ingibjørn Royðutoft og Ólavur Jacobsen fara at tosa um tað at bera gleðiboðskapin út.

Týskvøldið verða somuleiðis tveir fyrilestrar á skránni. Báðir fyrilestrarnir hava tað til felags, at teir snúgva seg um nøkur viðurskifti, ið ein eigur at hugsa um í samband við framførslur. Samuel Jacobsen fer at tosa um ljóðtøkni, meðan Ásbjørn Berthelsen hevur valt »So tað hoyrist og sæst« sum yvirskrift yvir sítt evni.

Seinasta evnið sum verður tikið upp á seminarinum er eitt, ið Jógvan Zachariassen hevur valt at kalla »Tónleikur og tíðarrák«.

Allir fyrilestrarnir verða hildnir í Barnasalinum og í Kafeterianum, og byrja teir kl. 19:30.


*Góður stemningur í Kelduni í fjør, tá bæði føroyskir og útlendskir úrmælingar settu sín dám á festivalin*
*Mynd: fjarðafestival.com*

# – Vit eru klárir

**Í SKÁLAFIRÐI** Hesar seinastu mongu mánaðirnar hava fólk í, og rundan um samkomuna Kelduna havt eitt stórmál í huga: Fjarðafestivalin 2010.

Snorri Brend

Nógv praktiskt fyrireikingararbeiði er gjørt. Nógvar telefonsamrøður og mailar eru sendir og móttiknir. Nógvir kvøld- og náttartímar eru farnir til fyrireiking. Og síðst, men kanska ikki minst eru nógvar stundir brúktar í bøn til Guds um, at hesin festivalurin má verða til signingar og gleði fyri mong.

– Ja, vit eru í øllum førum klárir, slær ein av stigtakarunum, Vinjard Johansen fast, tá vit høvdu hann í telefonini í gjárkvøldið.

Fyrstu tiltøkini – eitt seminar – byrja í kvøld og tónleikurin hóskvøldið. Og í dag verður eisini farið undir tað praktiska arbeiðið at seta tjaldið upp og annars rigga tað seinasta til.

### Fyri hvørt oyra

Stigtakararnir til Fjarðafestivalin hava so líðandi fingið størri og størri royndir við at skipa fyri einum so stórum og umfatandi tiltaki, og sum tað tekur sína tíð at fyrireika.

Festivalurin hevur eitt rímiliga fast innihald, men broytingar eru kortini í. Dentur verður lagdur á, at øll skulu kunna koma á festivalin og øll skulu kunnu fáa nakað burtur úr. Tí verður bæði tónleikur fyri børnini, tey tilkomnu og sjálvandi eisini til tey ungu.

Onkrar broytingar verða sjálvandi framdar. Í ár verður í øllum førum tann broytingin, at meiri verður gjørt fyri børnini.

Haraftrat fer tónleikurin at verða framførdur á tveimum pallum – einum inni í stóra møtisalinum hjá samkomuni, og einum í stórum tjaldi, ið verður reist uttandura.

Men eingin festivalur uttan eitt høvuðsnavn. Í ár er eingin ivi um, at høvuðsnavnið er fyrrverandi limurin í kenda bólkinum Korn, Brian Head Welch.

– Eg tosaði við hann fríggjadagin. Og jú, hann er øgiliga spentur at koma til Føroyar. Tá vit Korntaktaðu hann fyrstu ferð, hevði hann ikki ánilsi um, hvar Føroyar lógu, sigur Vinjard Johansen. – Sovítt eg veit, er hetta eisini fyrstu ferð at hann kemur til Europa.

snorri@sosialurin.fo


*Í fjør var Jeremy Camp høvuðsnavn á Fjarðafestivalinum. – Aftur í ár hava vit nakað til allar aldursbólkar og til tey, ið dáma ymiskan tónleik, sigur Vinjard Johansen sum her er avmyndaður saman við Mr. Camp*
Mynd: fjardafestival.com